# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at kæri maður og pápi okkara

**Olaf Krossteig**

andaðist sunnudagin 24. apríl, 97 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 28. apríl kl. 14.00

*Fyri tey avvarðandi*

**Estrid Krossteig**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jens Albinus,**
**Fámjin**

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi sunnukvøldið 24. apríl, 84 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum hósdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Fámjins kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Jústa, Svenny, Tórgerð og Jens Eli**

Tey, ið vilja minnast Jens kunnu lata Fámjins kirkju eina peningagávu.

## Tøkk

Við deyða og jarðarferð hjá elskaðu konu, mammu og ommu okkara

**Herthu Petreu Olsen**
**f. Heinesen**

hevur verið veitttur okkum ómetaligur stuðul og hjálp.
Vit vilja tí á hendan hátt, hjartaliga takka tykkum øllum, sum sýnt hava samkenslu.
Vit vilja takka tykkum mongu, ið stukku inn á gólvið við troystandi orðum og øðrum.
Øllum tykkum, sum komu við onkrum til ervið og ikki minst tykkum, ið stákaðust í Bygdarhúsinum.
Eisini takka vit fyri peningagávur og kransar, sangarunum í kirkjuni og tykkum mongu, ið fylgdu henni til gravar.
Eingin nevndur, eingin gloymdur.
Gud vælsigni tykkum øll.

**Árni**
**Jákup, Súsanna og Heri v/ familju**

### Minningarorð um frænda mín

## Joen Paula Hammer, Hvalbøur

Mong vóru minnini sum leitaðu fram í hugan, nú tá eg frætti, at frændi mín Joen Pauli Hammer var fluttur heim til Harran.

Pauli var elstur av níggju systkinum, og byrjaði sum siður var í stórum familjum, at taka lut í øllum fyrifallandi arbeiði. Líka frá tí eg var smádrongur minnist eg Paula sum mín kærasti frændi.

Undir seinna heimsbardaga, tá nógv skip frá Føroyum sigldu við fiski til Bretlands, sigldi Pauli við »Marshal« frá Vági. Minnist eg sum 7-8 ára gamal, tá Pauli kom aftur heim eftir túr til England, at vit óvitarnir fingu góðgæti, sum ikki var so lætt at fáa hendur á tá.

Somuleiðis minnist eg, tá pápi mín, sum ofta var sjúkur, slapp at fylgjast við Paula tá leitað var eftir reka vesturi á Eiðinum í krígsárunum. Seinni tá eg var eldri, slapp eg ofta at vera við teimum beiggjunum Paula, Jensi og Johannesi, bæði eystanfyri eftir nátungum, og vestan fyri eftir fugli. Væl minnist eg tá farið var vestur undir bjørgini, og leitað var uppi í Fløttin undir ánni. Eg sum var lítið djarvur í bakkanum, dámdi best at halda meg nærri Jóhannesi, tí hann var so róligur. Pauli lá oftast útifyri í báti.

Trý seinastu árini, áðrenn eg flutti til Ísland, arbeiddu vit Pauli saman á Kolinum, Pauli var formaður í minuni, eg átti vørubil og koyrdi mennirnar til arbeiðis um morgunin og heim um kvøldið, arbeiddi eisini inni í minunum. Eg fór í huganum yvir, hvørjir mundi vera eftir á lívi av teimum, sum arbeiddu í Nýggjustovuminuni, og um eg ikki fari heilt skeivur eru tað ikki meiri enn 3-4 sum í dag eru á lívi.

Fyrstu ferð eg fór á sjógv var við hvalbiartrolaranum »Drátti« har Pauli var 2. stýrimaður. Pauli var ein av stóru eigarunum á trolarunum. Seinni vóru vit aftur saman til sjós, tað var við íslenska trolaranum »Hvalfelli« frá Reykjavík.

Seinast eg hitti Paula var fyri tveimum árum síðani, tá eg var heima og helt sjeyti ára føðingardag mín. Tá var Pauli so sjúkur, at ein kundi rokna við at hoyra boð um at hann var farin, nær tað kundi vera.

Tað var tung lagna, ið Pauli mátti bera í 37 ár. Í bestu manndómsárum at verða tikin og settur til síðis av sjúku sum ikki var møguleiki at lekja. Nú knapt 83 ára gamal var lívstráðurin slitin.

Tað var eitt, sum Pauli var klárur yvir. Hann átti vísan stað heima hjá Harranum sum hann hevði sett sítt álit á.

Konu hansara, Almu og børnunum, ja øllum hansara kæru senda vit Hemma okkara kærastu heilsur við bøn um at góður Guð styrki tykkum í sorg tykkara. Sorgin vendir til gleði, tá vit við ævigari vissu kunnu síggja, at okkara kæru eru farin til hin fagra æviga stað.

**Niels J. Erlingsson**
**Akureyri**

# Finnleif framsýnir í Fuglafirði

Fríggjadagin letur 39 ára gamli listarmaðurin, Finnleif Mortensen av Argjum upp málningaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði.

Á framsýningini hevur hann íalt 22 oljumálningar, sum hann hevur málað síðani á heysti í fjør. Seinasti málningurin varð málaður í farnu viku.

Íblásturin til myndirnar er fingin til vega úr føroyskum bygdarløgum og úr teirri vøkru náttúruni, har honum dámar væl at ferðast í.

Framsýningin í Ribarhúsi letur upp fríggjadagin kl. 15 og er eisini opin leygardagin frá kl. 10 til 13 og sunnudagin frá kl. 14 til 19. Annars er framsýningin í stóran mun opin, tá Piddasa Handil er opin – hetta fram til 18. mai.

Finnleif Mortensen hevur áður luttikið á Várframsýningum og Ólavsøkuframsýningum, eins og hann hevur havt fleiri framsýningar sjálvur í Smiðjuni í Lítluvík. Í juni mánaði fer hann aftur at hava framsýning í Smiðjuni.





*Finnleif Mortensen hevur havt framsýningar á mongum støðum. Nú vitjar hann í Fuglafirði við 22 av oljumálningum sínum*

### 70 ár

Í dag, hósdagin 28. apríl verður Alma Bjartalíð, Klaksvík, 70 ár. Hon er burturstødd.

Dagurin verður hildin leygardagin 30. apríl millum kl. 10 og 14 í Bøgøtu 19 í Klaksvík.

### Dagurin

**28. apríl, Vitalis,** deyður umleið 171. Rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.